


# MASKINMEISTARI TIL NORRÖNU

## Vilt tú verða í fyrstu røð í føroyskari skipa- og ferðavinnu?

Smyril Line søkir eftir maskinmeistara til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flagg skipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at vera við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Títt komandi arbeiðspláss er eitt av størstu, bestu og nýggjastu skipum á Norðuratlantshavinum, og samstundis størsta skip føroyingar eiga. Hon tekur 1482 ferða fólk, 800 bilar og manningin tá hon er mest, telur heili 118 fólk. Aftrat góðum starvs treytum bjóða vit hartil eina áhugaverda ferða ætlan, góða løn og góða frítíðar avtalu.

**Førleika krøv til maskinmeistara:**

- Fulla maskinmeistara útbúgving við í minsta lagi STCW vinnubrævið, sum skipsmaskinmeistari av 1. stigi
- Heilsu-, sløkki leiðara-, roykkavara- og trygdarprógv
- Arbeiða sjálvstøðugt og góð samstarvsevnir
- Vit hugsa okkum, at tú hevur royndir frá størri skipum, men hetta er eingin treyt

**Setanartreytir**

Setanartreytir sambært sáttmála millum Maskinmeistarafelagið og Reiðarafelagið fyri farmaskip.

**Umsóknir**

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu sendast til:

**SMYRIL LINE**
Maskinstjórin
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

ella til: **chief.engineer@norrona.fo**

Umsóknir skulu verða okkum í hendi **í seinasta lagi 19. juli 2010.**

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Maskinstjóran á:

**+298 34 48 46** ella
**chief.engineer@norrona.fo**

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyum, Íslandi, Týsklandi og Danmark. Umframt egnar skrivstovur, hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginpartinum av evropeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE · YVIRI VIÐ STROND 1 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN · TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO

WWW.SMYRILLINE.FO

ÚTBJÓÐING

## Nýggjur skrivstovubygningur hjá Havnar Arbeiðsmannafelag á horninum Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka

Við hesum bjóðar Landsverk áhugaðum arbeiðstakarum til undangóðkenning at gera nýggjan skrivstovubygning til Havnar Arbeiðsmannafelag.

**BYGGIHARRI**
Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn
www.landsverk.fo
lv@lv.fo

**Útbjóðingarháttur**
Innboðin lisitatión í høvuðsarbeiðstøku aftaná undangóðkenning. Ætlandi verður heitt á 4–6 tilboðsgevarar at bjóða.

**Lýsing av verkætlanini**
Verkætlanin umfatar niðurtøku av verandi bygningi á horninum Tinghúsvegur/Bøkjarabrekka og bygging av nýggjum skrivstovubygningi á staðnum. Harafturat er ein minni umvæling av grannabygninginum, har sum Landsverk heldur til í dag. Verkætlanin er treytað av myndugleikagóðkenning, og er ætlanin at byrja arbeiðið í okt. 2010. Arbeiðið skal vera liðugt í okt. 2011.

**Umbøn um luttøku**
Umbønin skal sendast til Landsverk ella umvegis teldupost til lv@lv.fo
Áheitanin skal verða okkum í hendi **í seinasta lagi týsdagin 13. juli, 2010**.

**Áheitan um luttøku**
Áheitanir um at geva tilboð verða sendar út saman við útbjóðingartilfarinum tann 23. juli, 2010.

**Samtøk og felagsskapir**
Allir luttakarar í einum samtaki ella líknandi felagsskapi skulu geva skrivliga váttan fyri felags hefting og ábyrding fyri sáttmálanum. Felagsskapir og samtøk skulu harafturat frammanundan tilnevna ein umboðsmann við skjalprógvaðari fulltrú til, vegna felagsskapin ella samtakið, at tekna bindandi avtalur við byggiharran.

**Upplýsingar at nýta til undangóðkenningina**
Umsøkjarar skulu saman við eini umbøn um luttøku senda hesar upplýsingar:

- Upplýsingar um bygnaðin hjá fyritøkuni, herundir møguligt samband við móðurfelag.
- Trú- og heiðurváttan um skuld til tað almenna.
- Avrit av viðkomandi ábyrgdartrygging.
- Upplýsing um roknskapartøl tey seinastu trý árini.
- Upplýsing um árliga meðaltalið av fólkum í starvi hjá fyritøkuni seinastu 3 árini.
- Upplýsing um møguligar undirveitarar. Serliga er tað niðurtøka, jørð og betongarbeiði, sum arbeiðstakarin skal lýsa væl við tað at gravast skal út niður á -7m frá verandi vegkotu.
- Ummæli frá samsvarandi uppgávum.
- Lívsgongdarlýsing (cv) hjá lyklafólkum, ið verða sett á hesa uppgávu.
- Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og heilsuskipanir, umframt umhvørvisstýrisskipanir hjá fyritøkuni.

SENDISTOVAN

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK
*byggir land*

*Landsverk er ein stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*




**NÝGGJUR HANDIL Í MIÐLON**

*Nýggjur handil er latin upp í Miðlon við vøkrum klæðum úr Thailandi og ymiskum tingum.*

TELEFON 27 88 05

**Lesið Sosialin - so eru tit við**

